## DAGSINS MEINING

### Bílig undanførsla

Málið um útlendsku hondbóltsleikararnar í Vági setti av álvara gongd í kjakið um, í hvønn mun vit skulu hava útlendska arbeiðsmegi í landinum, og undir hvørjum formum hetta skal vera.

At ein burturvísing av tveimum ósekum og ivaleyst eisini óvitandi litaviskum kvinnum, skuldi til, áðrenn málið varð tikið upp á politiskum stigi, er í sjálvum sær ein sorgarleikur. Serliga fyri tær báðar kvinnurnar, men so sanniliga eisini fyri VB, føroyskan hondbólt og ikki minst føroyska rættarsamfelagið.

Tí í veruleikanum er hetta eitt evni, sum tað leingi hevur trongt til eina loysn. Ein loysn, sum kundi givið øllum pørtum á marknaðinum greiðar spælireglur á økinum, og sum eisini kundi víst fyri heimssamfelagnum, at eisini hesin partur av alheims-politikkinum er nakað, sum vit her í Føroyum vilja taka í álvara.

At viðgerðin av málinum er útsett til eina ætlaða yvirtøku, er stutt sagt ov bílig umbering í so máta. Hetta líkist mest av øllum eina roynd at skumpa trupulleikan frá sær, til hann verður so eyðsýndur, at hann skal loysast. Og so er lætt eftirfylgjandi at staðfesta, at trupulleikin varð loystur, tá málið gjørdist føroyskt málsøki. Danskir ministarar hava í øllum førum kunna lóggivið undantøk á ymsum slag á økinum, og at Landsstýrið nú tykist kunna loysa trupulleikan eftir góðari viku bendir eisini á, at tað ikki hevur verið nøkur forðing, at talan er um danskt málsøki.

Hvørji atlit skulu takast í slíkum lógarverki, er upp til politisku viðgerðina at gera av. Men í hesum arbeiði er neyðugt at staðfesta, hvørji samfelagslig atlit skulu takast, og ikki minst er tørvur á, at tað eisini stendur greitt fyri teimum útlendingum, sum koma til landið, hvørji rættindi hesi hava.

Men enn einaferð. At geva dønum skuldina fyri, at lógarverkið ikki er í lagi, er ov bílig undanførsla. Bert spell at tað nærum skuldi ein persónligur sorgarleikur til, áðrenn hetta varð staðfest.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Prædika

**Hans J. Hermansen**



Sunnudagin 16da november sendi ÚF guðstænastu úr Oyndarfjarðar kirkju. Jógvan Fríðriksson, prestur, prædikaði. Teksturin henda sunnudag var um miskunn við støði í líknilsinum um hin skuldarbundna tænaran.

Onga løtu ivist eg í, at tey, ið lýddu á hesa prædiku, mundu kenna farran av órógv, ótta, angist og sælu ta løtuna, hon vardi. Ein sjáldsama væl skrivað og talað prædika, sum gevur øllum landsins borgarum nógv.

Mín áheitan er, at henda prædika verður at síggja á prenti í onkrum blaði innan alt ov langa tíð, um tað er gjørligt. Mong høvdu fegnast um tað. Tíverri noyðast vit at vera røddina hjá presti fyriuttan, men tað tolir henda prædikan.

# Tur til Førøyene

**Jan Gulbrandsen**
*Nøtterøy, Norge*

Hei.

Torsdag 30 okt. kom jeg med Smyril til Torshavn for å oppleve noen dager på Færøyene.

Det ble en fantastisk opplevelse med all slags vær, noe jeg liker. Skal man ha sol og sommer kan man dra til syden. Jeg foretrekker å reise i "vesterled"

Kom til Føroyar hotell med fantastisk betjening. Flotte rom og god mat. Da også Smyril line eier hotellet og arrangerte disse billigturene kunne de kanskje legge ut litt informasjon på hotellet om ting man kunne foreta seg på Færøyene noe høstdager. Jeg mener at noen guidede turer kunne man vel ha organisert når man vil prøve og utvide turistsesongen.. Noen extremturister vil jo alltid melde seg på denne typen turer. Ellers var jo turistkontoret meget behjelpelig med informasjon.

Fikk en flott helikoptertur til Mykines med fotur rundt på øya, helt fantastisk.Fikk også en flott tur til Sandoy. pluss flere flotte bilturer. For noen veier.

At vi måtte ut av hotellet kl.. 11 selv om båten ikke gikk igjen før kl. 22, var kanskje litt unødvendig når det ikke var mer enn ca. 20 gjester på hotellet( man kunne få ha rommet frem til avgang mot kr. 400).

Jeg håper virkelig Smyril ( en kino på båten hadde gjort tilbaketuren noe kortere) klarer å opprettholde disse turer da jeg helt sikkert vil komme tilbake til deres fantastiske øyer med denne mektige naturen og usedvanlige hyggelige menneskene **(Og for noen flotte og vakre kvinner)**

En sommer skal jeg tilbake for å gå mer i deres flotte natur. Dere har virkelig et land å være stolte av. Synd dere ikke ble under Norge.

Ps.: Er det mulig å få tilsendt avisen hvis dette leserbrev komme i Deres avis?

På forhånd takk.

# Tónleikakvøld

TÍÐINDASKRIV

Fríggjakvøldið 5. desember kl. 21-23 verður fjølbroytt tónleikakvøld í Norðurlandahúsinum í sambandi við útbúgvingarstevnuna Markleys Útbúgving.

Fyrst kemur Unn Patursson á pallin saman við Herluf Lützen við løgunum frá nýggju fløguni hjá Run.

Síðan spæla Kristian Blak og hansara menn (Heðin Ziska Davidsen og Mikael Blak) meðan Anders Hjuler, lektari frá Københavns Pædagogseminarium, ið luttekur á útbúgvingarstevnuni, málar við íblástri frá tónleikinum, sum er úr Ravnatingi: Ravnagjógv, Ravnating og Skýríkið.

Nýggja altjóða navn okkara Teitur Lassen fer hetta kvøldið at syngja og spæla síni løg.

Rútmiska kórið og tónleikaflokkar frá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði undir leiðslu av Zakariasi Sørensen og Hans Oliver H. Joensen enda kvøldið.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Gráir týdningar

## eftir Oddfríð Marna Rasmussen

TÍÐINDASKRIV
*Mentunargrunnur Studentafelagsins*

Høvundurin kallar bókina hjá sær fyri »Viðbrøgd«, ið merkir knapplig rørsla ella kvik vending. Hvussu víkur og vendir, so er savnið ein í føroyskum høpi fullkomilig nýskapan. Lagt verður fyri við støði í málninginum »Í Hoyna« eftir Pieter Bruegel frá 1565 at lýsa ætt fólki hjá Ronald Reagan forseta.

Síðani fara stuttir tekstir um lív og upplivingar amerikanska forsetans, men í høvuðsheitum gjøgnum hugan á tí alzheimer rakta. Hesin parturin endar við eini vitjan í oyggjalandi fyri norðan. Miðparturin av savninum eru yrkingar, meðan hugkveikjandi »málningatekstir« fara við seinasta triðinginum. Lýsingarnar eru ikki sørt merktar av bæði spei og skemti.

»Gráir týdningar« er løgd til rættis og prentað á Hestprent. Hon er 123 bls. til longdar og kostar kr. 140. Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út.




# Brennivargurin

## eftir Jógvan Isaksen er aftur at fáa

TÍÐINDASKRIV
*Mentunargrunnur Studentafelagsins*

»Brennivargurin« hevur verið útseld í fleiri ár, men tann vælumtókta krimisøgan er nú aftur at fáa. Kúllarnir Kári og Rói ganga í 6. D í kommunuskúlanum. Tað er ikki frítt fyri, at teimum dámar at arga lærararnar og ikki altíð við mýkindum. Men teir fáa álvarsligari trupulleikar at takast við, tá ið teir saman við vinfólkunum Magnusi og Beintu seta sær fyri at fanga ein brennivarg.

»Brennivargurin« er løgd til rættis og prentað á Hestprent. Hon er 132 bls. til longdar og kostar kr. 148. Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út.




# Steintór gevur út yrkingasavn

**Í dag verður móttøka í Leikalund í Klaksvík í samband við, at Steintór Rasmussen gevur út yrkingasavn. "Føroyingar liva ikki av fiski eina", er fyrsta hjá yrkingasavnið hjá honum. Steintór hevur tó longu gjørt navn sítt kent við fleiri av sangum sínum, sum eru vorðnir fólkaogn í Føroyum**

YRKINGASAVN
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Eg eri 11 ár og syngi um gular kavbátar
Luftin er køld
Ikki í Føroyum men í heiminum
Várið kom ikki til Prag men kríggið kom til Vietnam
11. september 1971 doyr Nikita Khrusjov
Maðurin sum tá Beatlarnir byrjaðu
hevði 3. veraldarbardaga í russisku roulettini




*Í dag klokkan 16.00, verður móttøka í Leikalund í Klaksvík, har Steintór Rasmussen fer at signera yrkingasavn sítt, "Føroyingar liva ikki av fiski eina"*

Hetta er brot úr einari av teimum 27 yrkingunum úr yrkingasavninum hjá Steintóri Rasmussen, "Føroyingar liva ikki av fiski eina".

Steintór er føddur í 1960, og hevur frá ungdóminum av yrkt og skrivað sangir.

Sangskrivingin tók dik á seg, tá ið tónleikabólkurin, Frændur, í 1984 kom á pallin. Og í dag eru nógvir av sangum hansara vorðnir fólkaogn í Føroyum.

Hann hevur givið fleiri fløgur út, eitt nú, "Millum Frændur" og "Kærleikans Vallaraheim".

Í 1980 vann hann, við yrkingini, "Tey dansa eins og skuggar", kappingina, sum Amnesty International í Føroyum skrivaði út.

Seinastu árini hevur Steintór skrivað sangir til børn. Hann eigur orðini og fleiri av løgunum til tríggjar av fløgunum, "Kularøtur", sum hann gav út um aldarskiftið.

Í 2000 føroyskaði hann eina minnisfløgu um svian, Bjørn Afzelius.

Á móttøkuni í Leikalund í dag klokkan 16.00, fáa fólk høvi at heilsa upp á Steintór og fáa yrkingasavnið signerað.

"Føroyingar liva ikki av fiski eina", kostar 120 kr.

# Portørar fingu sáttmála

**Mikudagin samdust Fíggjarmálastýrið og HA um nýggjan tvey ára sáttmála fyri portørar og ambulansustarvsfólk**

SÁTTMÁLI
*Jákup Mørk*

Fíggjarmálaráðið hevur boðað frá, at semja er fingin við Havnar Arbeiðsmannafelag um nýggja sáttmála fyri portørar/ambulansustarvsfólk á sjúkrahúsinum.

Í tíðarskeiði num frá 1. oktober 2003 og tvey ár fram fáa portørarnir ein lønarvøkstur upp á góð 7%. Hartil eru 2% av lønarrammuni nýtt til eina eyka fríviku, soleiðis at samlaði sáttmálavøksturin er umleið tey 9%.

Umframt lønarvøksturin, so inniheldur semjan eina avtalu um førleikamenning umframt aðrar smærri broytingar. Og endaliga sigur fíggjarmálaráðið í tíðindaskrivi, at partarnir í sáttmálaskeiðnum fara at hyggja at møguleikanum at fáa aðra vaktarskipan, soleiðis at hendan verður meira álík hinum vaktarskipanunum, sum eru galdandi fyri sjúkrahúsverkið. Miðað verður eftir, at hetta arbeiði er liðugt tann 30. apríl 2004.

# Stór seyðahundakapping í Vágadali komandi leygardagin 22/11

**Komandi vikuskifti verður ein av teimum stóru seyðahundakappingum í Føroyum har 21 hundar fara at kappast í trimum klassum.**

SEYÐAHUNDA-KAPPING
*tiðindaskriv*

Kappingin verður í Vágadali leygardagin 22. november og byrja verður kl 10.00, tá 9 hundar skulu kappast í klassa 3, ið er at heita seyð, sum stendur uml 400 metur burtur.

Uml kl 13.00 verður klassi 2 har 6 hundar luttaka, teir skulu heinta seyð, ið stendur120 m burtur og umleið14.30 byjar klassi 1 har 6 hundar eisini luttaka, her stendur seyðurin 80 m burtur.

Hetta er eisini fyrstu ferð at kappinging er skipa eftir altjóða reglum.

Tað eru sera fá avboð komin, so væntandi verður, at tað ein sera spennandi kapping.

Vinnararnir fáa steyp, ið eru givin av Sørvágs Ursmiðju.